Havnar Bio
kall
Coca-Cola

UMMÆLI:

# Lítli Hønsnarungin hjá Disney

*Kim Simonsen*

Disney hevur gjøgnum árini givið okkum barnafilmar sum Bambi, Alice in Wonderland, Snjóhvíta. Filmar, ið ofta bygdu á kendar figurar frá ævintýrum, ið vit øll, børn og vaksin, skilja og dáma. Seinastu árini er Disney farin at kappast um at gera teknifilmar, ið nærum allir eru aktionfilmar, so um Toy Story og filmar um Buzz Lightyear, sum er hetjan frá hNýggjasti figururin hjá Disney er ein lítil hønsnarungi, ið bert eitur Little Chicken, ella Lítli Hønsnarungin. Hesin er ikki soleiðis víðari sjarmerandi. Hann er lítil og hevur brillur.

Her sær út sum um Disney ikki longur trýr á gomlu uppskriftina við at gera filmar um ævintýr. Felagið hevði eina stóra framgongd við filminum ”The Lion King” í 1994, men síðani hevur tað ikki gingið so lætt hjá teimum, tí eru tey helst nærum desperat eftir at skapa ein nýggjan darling, ið so skal vera hesin Lítli Hønsnarungin.

*Himmalin dettur niður*

Søgan byrjar vi einum braki, tí ein partur av himmalinum er dottin niður. Hetta uppdagar Lítli Hønsnarungin, hann kemur at seta allan býin á hin endan, tá hann ringir við kirkjuklokkuni, men eingin trýr honum. Pápin og hann fáa ringt orð á seg, tí tey halda at Lítli Hønsnarungin gjørdi ónaðir. Pápi hanaungan er Gormur Gok, ið biður Lítla Hønsnarungan um at ansa sær og ikki ger so nógv vart við seg, men Lítli Hønsnarungin vil hava at fólk skulu trúgva honum.

*Ljóti dunnuungin*

Í filminum er hesin Lítli Hønsnarungin vinur við Gerdu, Fisk og Pjevs. Gerda er ein ljótur dunnuungi, her er so ein heilsan til H. C. Andersen. Pjevs er ein ovurstórur, feitur, býttur og bangin grísur. Fiskurin á landi er ein fiskur, ið ongantíð sigur nakað, men er tó hjálpsamur.

Gerda veit alt møguligt, serliga hvat stendur í vikubløðum. Hon tosar um, at vinurin Lítli Hønsnarungin skal tosa við pápa sín, og ikki bert royna at fáa viðurkening frá honum. Her er eitt klassiskt undirtema, ið kundi borið allan filmin, at Lítli Hønsnarungin m.a. vil spæla baseball, fyri at gerast sum pápin.

Við eitt so fyrigeva fólkini í býnum Lítla Hønsnarunganum, men seinni er aftur galið, tí aftur byrja stykki at detta av himmalinum. Saman við Gerdu, Pjevs og Fiski, finnir Lítli Hønsnarungin eitt rúmdarskip.

*Eitt modernaða ævintýr?*

Leikstjórin Mark Dindal hevur leingi droymt um at gera gjøldur burtur úr gomlu ævintýrgenruni, við Chicken Little hevur hann so fingið loyvið, at ger sum hann vil. Men her er einki av gandinum, sum er í modernaðum ævintýrum sum ”Beauty and the Beast”, tí sera stuttliga ”Lilo & Stitch” og ”Brother Bear”. Serliga tónleikurin í filminum er ræðuligur, bert gomul Spice Girls hitsangir, ið skulu raka tey sum eru 12 ár, men tey 12 ára gomlu í dag vóru 2 ár tá Spice Girls vóru frammi.

Gomlu ævintýrini hava altíð veri um outsidarar, so sum Øskufía, Kloss Hans og í ”Chicken Little” er eisini um Lítla Hønsnarungan og hansara tríggjar outsidaravinir, men tá søgan haltar, so hjálpa hvørki animatiónstøkni ella Spice Girls. Ein vánaliga teknaður filmur við eini góðari søgu, er altíð betur



enn ein slík gigantisk framleiddur komersiellur og fortonktur filmur, ið ikki er gjørdur tí nakar er góður við eina serliga ella erliga søgu, men gjørdur fyri at fáa peningin at spræna úr lummunum á fólki, ið eiga børn. Sjálvandi er gjørligt at keypa alskins dukkur, koppar, klæðir við myndum frá filminum.

*Eitt flop*

Eg eri ótrúliga vónsvikin av at Disney, ið plagdu at borga fyri góðsku, er enda sum eitt innantómt felag, har fíggjarfrøðingar og trendgranskarar avgerða hvat animatións- og teknifilmar skulu snúgva seg um, so teir kunnu raka ein hugsaðan málbólk, ið eru ókritiskar barnafamiljur, ið skulu rænast.

Her eru segmentskanningar, ið stýra øllum og fíggjardeildin hjá Disney og stjórarnir í teirra klædningum, ið eru settir at avgera, hvat er vert at gera film um, ið altíð er tað sama sum tað sum selur nógv.

Problemið er, at eg ongantíð kom inn í hendan filmin, hann er ágrýtin, algoystur og tivandi upphitaður allan vegin. Ein hending fyri og onnur eftir, harður rokktónleikur og vánaligar balladur uttan íhald. Her er bert róp, aktion og skrál..

Hetta eru 100 prosent tómar kaloriur frá Disney, og sigur líka so lítið sum ein hálvur litur av kola, aftaná hann er drukkin. Filmurin ”Chicken Litle” er stutt sakt ein av teimum ringastu Disneyfilmunum, ið nakrantíð er gjørdur. Tað kann gott vera, at eg eri ein gamal romantikari, men gev mær heldur ”Fantasia” frá 1940, ”101 dalmatinere” ”Dumbo” ja alt annað enn hendan filmin, ið tí bert fær 1 stjørnu av 6.

**Chicken Little. USA 2005. 86 minuttir.**
Røddir á donskum:

| | |
|---|---|
| Lille Kylling: | Mathias Klenske |
| Gerda Gråand: | Sofie Gråbøl |
| Pjevs: | Christian P |
| Fisk: | kontorets vandkøler |
| Rikke Ræv: | Charlotte Munk |
| Gorm Gok: | Waage Sandø |
| Per & Tine Bissenberg: | Kjeld & Hilda Heick |
| Leikstjórn: | Mark Dindal |

TÍÐIRNAR:

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu




## Fun with Dick & Jane

*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag 10.02 | kl. 19.30 | kl. 21.30 | kl. 23.30 |
| Leygardag 11.02 | kl. 19.30 | kl. 21.30 | kl. 23.30 |
| Sunnudag 12.02 | kl. 20.15 | kl. 22.30 | |



## Lille Kylling

*FRUMSÝNING*

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag 10.02 | kl. 15.30 | kl. 17.30 |
| Leygardag 11.02 | kl. 15.30 | kl. 17.30 |
| Sunnudag 12.02 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |




## Afsporet

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 10.02 | kl. 20.00 |
| Leygardag 11.02 | kl. 20.00 |
| Sunnudag 12.02 | kl. 19.00 |




## München

*FRUMSÝNING*

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 10.02 | kl. 22.30 |
| Leygardag 11.02 | kl. 22.30 |
| Sunnudag 12.02 | kl. 21.30 |




## Nanny McPhee

| | |
|---|---|
| Fríggjadag 10.02 | kl. 18.00 |
| Leygardag 11.02 | kl. 18.00 |
| Sunnudag 12.02 | kl. 16.30 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**